## RG-laksur ikki etandi

Vanliga plaga laskaúrdráttir hjá grønlendsku fyritøkuni Royal Greenland at fáa góð umdømi uttanlands, men so var ikki, tá Berlingske Tidende setti nøkur fólk at døma royktan laks frá ymsum veitarum. Fólkini vistu ikki, hvør fyritøkan hevði latið hvat, men tey vóru ikki í iva um, hvat slag var tað ringasta, og tað vísti seg at vera frá Royal Greenland. Dómararnir vóru eisini á einum máli um, at laksur úr Skotlandi var tann besti.



## Varnir borgarstjórar

Borgarstjórarnir í Grønlandi hava einki ímóti, at tað almenna leggur ávís málsøki út til kommunurnar, men teir krevja, at tey fíggjarligu viðurskiftini skulu upp á pláss fyrst. Tað var niðurstøðan av einari ráðstevnu millum borgarstjórar og kommunustjórar, sum var í Nuuk í síðstu viku. Ráðstevnan umrøddi eisini spurningin um, hvørjir býir verða umsitingarbýir aftan á samanleggingina, men tann spurningurin verður ikki avgreiddur fyrr enn 8. apríl.

# Jenis av Rana droymdi ikki um blíva ákærdur

**Hetta hevur verið hart fyri familjuna og tað er ein ótrúligur lætti, at tað nú nærkast endanum. Men eg hevði ikki droymt um, at fútin fór at ákæra meg, sigur Jenis av Rana**

LØGREGLUMÁL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta hevði ikki droymt um.

Tað kemur púra óvart á Jenis av Rana, at fútin nú ætlar at ákæra hann fyri at hava brotið sína sína skyldu sum kommunulækni.

Tað skal hann hava gjørt, tá ið ið ein blaðung genta var í viðtalini hjá honum og fortaldi honum, at hon varð blivin kynsliga misbrúkt av pápanum.

Men hóast Jenis av Rana fekk hetta at vita í viðtalini, læt hann vera við at boða barnaverndini frá, hóast kommunulæknar hava skyldu at boða frá slíkum, sigur fútin.

Upprunaliga var tað eisini ein spurningur um hann hevði brotið sína tagnarskyldu við at hava tosað við onnum um, hvat gentan skal hava sagt, men Jenis av Rana verður ikki ákærdur fyri nakað í hesum sambandi.

- Eg eri ómetaliga fegin um, at fútin hevur ásannað, at onki er í skuldsetingunum um at eg skal hava brotið tagnarskylduna, tí hon hevur stóran týdning fyri meg, bæði sum lækni og sum politikari,



*– Eg ivist ikki í at eg verði fríkendur, tí ongin hevur fortalt mær um kynsligt misbrúk, sigur Jenis av Rana. Fekk eg nakað slíkt at vita, hevði eg ikki blunkað við at melda tað bæði til barnaverndina og løgregluna, leggur hann afturat, her avmyndaður í tíðindasendingini á Rás 2 á middegi*

*Mynd: Caroline Eriksson og Marika Hill*

### Ikki droymt um

Eftir stendur so, at Fútin ætlar at ákæra hann fyri at hava brotið fráboðanarskylduna.

Hetta hevði Jenis av Rana ikki droymt um.

Og hann tvíheldur um, at hann er púra ósekur.

- Ongin hevur verið inni í míni viðtali og fortalt mær um kynsligt misbrúk, leggur hann dent á.

Ongin hevur fortalt mær nakað, sum hevur givið mær illgruna um kynsligt misbrúk, leggur hann afturat.

Í viðtalini hevur hann heldur ongantíð tikið onnur atlit enn tey hjá sjúklinganum.

Tí er hann eisini púra sannførdur um, at hann verður fríkendur.

- At fútin bara vil hava meg at betala bót, sigur kanska eitt sindur um, hvussu vís tey eru í teirra sak.

Jenis av Rana staðfestir, at hevði hann fingið kunnleika um nakað slíkt, hevði hann ikki ivast í at boðað bæði barnaverndini og løgregluni frá

- Tað hevði verið mín skylda eftir lógini og tað hevði verið mín moralska skylda, sigur hann.

- Men sostatt vil fútin hava Føroya Rætt at døma meg fyri eina vitan, sum eg ikki havi havt.

### Ein hørð tíð

Tað eru næstan tvey ár síðani, at málið kom upp og Jenis av Rana sigur, at fráboðanin um ákæruna er tað fyrsta, hann nakrantíð hoyrir frá fútanum.

Jenis av Rana heldur, at hetta hevur verið harðari fyri familjuna, enn tað hevur verið fyri hann sjálvan.

- Eg eru sálarliga sterkur, men hetta hevur verið eitt hart trýst, serliga hjá mínum næstringum hevur hetta verið ein hørð tíð.

Hinvegin leggur hann afturat, at hetta hann nú er ómetaliga fegin um, at tað loksins eru útlit fyri, at hetta málið nú fær ein enda.

Jenis av Rana sigur, at annars væntar hann ikki at hann verður førur fyri at røkja sítt kommunulæknastarv til fulnar teir næstu dagarnar og tað hevur hann boðað fakfelagnum frá.

- Eg havi brúk fyri einum "time out" . Eg má bara fáa stundir at fáa tað ringasta afturum, men eg vænti, at um nakrar dagar eri til arbeiðis aftur, sum vant.

Annars heldur hann ikki upp á nakran máta, at hetta hevur skaðað hansara umdømi sum kommunulækni.

- Sjúklingarnir hava vent mær bakið. Tvørturímóti er gravgangur eftir at fáa meg til lækna, men eg havi ov nógvar sjúklingar frammanundan og tí verðið eg hvønn dag noyddur at vísa sjúklingum frá mær, tí eg fái ikki tikið fleiri.

### Verður verandi í Løgtinginum

Hinvegin er eisini greitt, at Jenis av Rana ætlar sær ikki at leggja løgtingssessin frá sær av hesum.

Hann sigur, at hetta hevur onki sum helst við hansara starv sum politikari at gera og hann dugir ikki at síggja nakra orsøk til at fara úr tinginum av hesi orsøk.

Hinvegin heldur hann tað er vandi fyri, at hetta kann hava elvt til, at eg havi mist atkvøður, tó at eg eri væl nøgdur við úrslitið.

- Á løgtingsvalinum hesuferð lá eg á markinum til at fella og hetta málið kann hava elvt til, at eg havi mist atkvøður, tó at eg eri væl nøgdur við úrslitið.

## Løgtingið taka órinið frá Jenis

**Nú Fútin ætlar at ákæra Jenis av Rana, er Løgtingið biðið um at taka politiska órinið frá honum**

Løgtingið skal nú taka politiska órinið frá Jenisi av Rana, løgtingsmanni.

Tað hendir, nú fútin ætlar at ákæra hann fyri at hava brotið sína fráboðanarskyldu sum kommunulækni í einum málið um kynsligt misbrúk.

Men løgtingslimir kunnu ikki ákærast uttan víðari, tí fyrst skal Løgtingið taka politiska órinið frá honum.

Og tað fer fútin nú at biðja Løgtingið gera.

Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, sigur, at ein slík umbøn frá fútanum kemur fyrst til viðgerðar í formansskapinum. Er formansskapurin samdur í, at órinið skal takast frá fútanum, leggur hann uppskot fyri Løgtingið, sum so tekur tað til viðgerðar.

Slík mál plaga at verða avgreiðsluspurningar, sum Løgtingið samtykkir rættiliga skjótt og løgtingsformaðurin sigur, at tá ið ein slík áheitan kemur frá fútanum, fer Løgtingið ikki at drála við at viðgerða tað.

-áki-